gult cyan magenta svart



# Strálan hevur funnið rætta stevið

***6 mannafør**: Men kappingin millum menninar var nógv størri, enn hon var millum kvinnubátarnar*

Kvinnurnar umborð á Jarnbardi vónaðu eftir sigurin á norðoyarstevnu, at tær fóru at vinna róðrarnar í stórari kapping við aðrar bátar. Vónin at vinna hvørja ferð er vorðin veruleiki, men tað er synd at siga, at tær hava fingið kapping frá hinum manningunum. Jarnbardur hevur verið í serflokki, og hinir bátarnir hava kappast um næstfremsta plássið.

Nýggi Gongurólvur eigur framvegis fyrsta sigurin á – bæði í kvinnukappingini og mannfólkakappingini. Hesa ferð stríddust kvinnurnar hjá Havnar Róðrarfelag við Hvessingin um næstfremsta plássið. Tað var heilt tætt millum bátarnar, men Hvessingur var eina hálva bátslongd fyrri á mál.

Kvinnurnar umborð á Fuglfirðingi vóru aftur hesa ferð drúgvar. Merkisvert var tað, at Páll Fangi, sum tað hevur gingið rætta vegin hjá, heilkiksaði í startinum og endaði næstaftastur.



*Jarnbardur gjørdist tryggur vinnari hjá kvinnunum og Strálan vann kappingina hjá 6-mannaførum menn*

**Tøtt kapping**

Millum 6–mannaførini við monnum var kappingin so spennandi sum onga aðra staðni á Sundalagsstevnuni. Tá teir kappaðust í Vági noyddist Gongurólvur at fáa ein nýggjan mann umborð, tí ein av manningini ikki slapp suður við Smyrli, sum var fullsettur fyrapartin næstsíðsta leygardag.

Á Kollafirði tóktist tað á fyrstu metrunum sum um havnarmenninir ætlðu at taka hevnd, men tað var skjótt at tað fór at myndast sum tað gjørdi í Vági.

Strálan og Hvessingur vóru í sera harðari kapping um fremsta plássið. Hvessingur var fremstur eina løtu. So bjóðaði Strálan av, eina góða løtu var púra javnt, og tá bátarnir fóru um málið, var munurin ikki meiri enn ein skutur.

Sigurin hjá strandabátinum ger, at teir av álvara eru komnir upp í kappingina um FM. Eftir jóansøkusigurin segði bátsformaðurin, at broytingarnar umborð høvdu havt við sær, at báturin gekk nógv betur. Teir høvdu gott mót um tað, sum var eftir at kappast um, og avrikið á Kollafirði vísti, at strandingar eru væl fyri.

jh

# Stríðið um næstfremsta plássið er sera stórt

***8–mannafør:** Hóast stóra kapping megnaði Toftabáturin at halda tørn um plássið aftanfyri sannførandi Argjabátin*

Luttøkan var aftur hesa ferð serliga stór. Trettan bátar vóru við í næstsíðsta róðrinum á Kollafirði. Men hóast bátarnir vóru so nógvir, sum ttað sjáldan er komið fyri í kappingini millum 8–mannafør, so var eingin kapping um fremsta plássið, og tað var bara í heilt fáum førum, at fleiri bátar komu á mál so at siga í senn.

Argjabáturin hevur vunnið alt higartil í ár, og á Kollafirði var hann aftur sera sannførandi. Fleiri høvdu hug at bjóða seg framat á fyrstu metrunum, men tað var heilt skjótt, at Argjabáturin skræddi seg framum allar hinar. Á túsund metra málinum var hann klárt nummar eitt, og síðani økti hann stútt og støðugt. Á málinum var munurin aftur til hinar tvær bátslongdir.

Stóri spenningurin snúði seg aftur hesa ferð um, hvør fór at verða næstfremstur. Toftabáturin hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ stríddist um hetta plássið saman við Nevinum Reyða úr Klaksvík og saman við Gullbrandi, sum er mannaður í Vestmanna.



Úrslitið var, sum tað hevur verið á undanfarnu stevnunum. Nevið Reyða royndi at bjóða Toftabátinum av, men sum í undanfarnu kappingunum vóru klaksvíkingarnir ikki nóg drúgvir, og á málinum var um reppið, at eisini Gullbrandur hevði tikið Nevið Reyða.

Í aftara endanum var tað merkisvert, at 1. deildarliðið hjá B36 bjóðaði seg fram umborð á Sjóriddaranum, sum er av Oyri. Fótbóltsspælararnir vóru ovurfegnir, tá tað var greitt, at teir – í harðari kapping – høvdu vunnið á Víkarbátinum, og ikki minst tóktist tað koma væl við, at hinir báðir havnarbátarnir – Knørrur og Ørvur – endaðu aftanfyri B36!

**jh**




FLOGFRAKT/
SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING
& ØLL PAPPÍR
Tlf. 32 22 22

Heitlufts-aggregat til flest øll endamál
• Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
• Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
• Gasovnar
• Hitakanónir
• Avfugtarir
Vit útvega eftir tygara tørvi!
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

fk

Møttøka fyri
Johan Nielsen
Í sambandi við at høvuðsvenjari okkara Johan Nielsen verður 60 ár, verður móttøka í Ítróttarhúsinum í Norðragøtu fríggjadagin 7. juli kl. 16.00-18.00
GÍ Gøtu Ítróttarfelag
Sosialurin - 311820

Kvívíkar kommuna
Vegna summarfrí, verður skrivstovan stongd frá 10. juli 2000. Opið verður aftur 7. august 2000.

Frá Føroya Psoriasisfelag
Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur fyri psoriasis til Bláa Lónið verður 8/9-2000 og heimaftur tann 6/10. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblaðið út og sendir tað til húðlæknan. Umsóknin skal latast inn seinast tann 7/8-2000. Eru ivaspurningar hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja tlf. 424179.
Samstundis boða vit frá, at aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10 c, mánadagin 17/7 kl. 20.
Vinarliga
Føroya Psoriasisfelag

Kavari
við HSE part 1 útbúgving ella líknandi, søkist.
Símun Jákup Højsted
tlf. 314716 ella 214716

Kunoyar skúli søkir lærara
Talan er um tíðaravmarkað starv við fullum tímatali fyri skúlaárið 2000/2001.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 14/7 og sendast til
Kunoyar skúlanevnd
v/ Honnu Magnussen
785 Haraldssund

Ung í arbeiði
Ert tú millum 16 og 26 ár og búsitandi í Runavíkar kommunu, kunnu vit møguliga bjóða tær arbeiði í 6 mánaðir í tiltakinum »Ung í arbeiði«.
Umsóknarbløð fáast á kommunuskrivstovuni.
Runavíkar kommuna

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Stongt vegna summarferiu til 21. aug.

BSV
Pf. Bygningssnikkaravirkið
Smyrilsvegur 4, FO-100 Tórshavn, Telefon 312587, Telefaks 310187
Snikkara-lærlingur
Søkt verður eftir lærlingi til bygningssnikkara, at byrja 14. august 2000.
Okkara framleiðsla er fjølbroytt, skrivstovuinnbúgv, køkar, innhurðar og alt annað snikkara-arbeiði.
Áhugaði kunnu seta seg í samband við okkum.

Reyði krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]
☎ 212380

RANDARHÚS TIL SØLU





Um nóg høgt boð fæst, eru randarhúsini í Niðarugøtu 42 í Hoyvík til sølu. Húsini frá 1991 eru 130 m² í trimum innrættaðum hæddum.
Loftshædd: Trý kømur og gongd. Atgongd til ovastaloft og altan.
Miðhædd: Køkur og stova í einum. Baðirúm, gongd og durur við hita í gólvinum.
Kjallarahædd: Íbúð við køki, stovu og kamari í einum – baðirúm við hita í gólvinum. Kjallararúm.
Telefon: 31 85 14 ella 21 85 14
Teldupostur: hiljan@post.olivant.fo


gult cyan magenta svart